# 2008 Januar



## Bussur av leið

**Ein býbussur í Havn fór úr leið, tá hann ein fyrrapart kom koyrandi niðan eftir Jónas Broncksgøtu. Tá hann kom niðan móti vegamótinum J. Broncksgøta/Hoyvíksvegur, vendi hann ikki, men helt beina leið fram upp á gongubreytina, rendi á grótgarðin og á ein lyktapela, áðrenn hann steðgaði. Bussurin fekk rættiliga stóran skaða, men eingin mansskaði hendi. Løgreglan staðfesti eisini, at bussførarin ikki var ávirkaður.**





*Risalop fram ímóti javnstøðu í føroyska tinginum. Sjey kvinnur vórðu valdar á løgtingsvalinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Kvinnurnar mannsterkar

**- Hetta er nokk til ein heilan bindiklubb, sigur Katrin Dahl Jakobsen, sum er ein av sjey kvinnum, ið varð vald í løgtingið. Ongantíð áður hava so nógvar kvinnur verið í føroyska parlamentinum**

Látur og klemm eyðkenna tær sjey nývaldu kvinnurnar hendan kalda mánamorgun, vit hava sett teimum stevnu til prát og myndatøku í forhøllini í tinghúsinum. Hetta er fyrstu ferð tær hittast eftir valið leygardagin - Katrin Dahl Jakobsen, Helena Dam á Neystabø, Annika Olsen, Rósa Samuelsen, Bergtóra Høgnadóttir Joensen, Annita á Fríðriksmørk og Bjørt Samuelsen.

Tær sjey kvinnurnar í løgtinginum vóna, at tær kunnu fáa gagn av hvørja aðrari, og nakrar longu hava prátað um møguleikan at arbeiða tvørturum floksmørk.

- Hetta skal ikki misskiljast soleiðis, at vit ikki kunnu vera ósamdar politiskt. Sjálvandi kunnu vit tað, men vit halda samstundis at tað hevur týdning, at vit gera okkurt tvørtur um floksmørkini, sigur Bjørt Samuelsen, sum er millum tær fýra nývaldu kvinnurnar.

### Kvinnubólk

Tær sjey rokna eisini við, at tær fara at stovna ein kvinnubólk, har tær kunnu samstarva. Hetta er vanligt í øðrum londum, har kvinnuligir parlamentarikarar viðhvørt seta sína egnu kvinnupolitisku dagsskrá.

- Tað fer avgjørt at merkjast, at vit eru so nógvar. Sjey gera stóran mun, sigur Katrin Dahl Jakobsen, sum hevur drúgvar royndir sum tingkvinna.

Ein av teimum royndastu tingkvinnunum er 39 ára gamla Annita á Fríðriksmørk. Hon roknar við, at politiskt fer tað at síggjast serliga væl aftur í fíggjarlógarviðgerðini, at so nógvar kvinnur nú taka sæti á tingi.

- Tá vit hava verið so fáar, er tað so nógv lættari at strika játtanir, sum raka kvinnurnar, til dømis barnsburðargrunnin, í mun til eitt nú sjómannafrádráttin. Ikki bara í tinginum sum heild, men eisini innanhýsis í flokkunum, sigur hon.

### Annan málburð

36 ára gamla Bergtóra Høgnadóttir Joensen er eisini millum tær nývaldu. Hon heldur, at javnvág millum kvinnur og menn er ein fyrimunur fyri eitt arbeiðspláss.

- Tað hevur avgjørt stóran týdning fyri dynamikkin, arbeiðslagið, málburðin og atburðin, at bæði kyn eru umboðað á einum arbeiðsplássi.

Og júst hetta við málburði og atburði er nakað, sum tær allar hava eina greiða hugsan um.

- Tað er ongin ivi um, at vit fara at síggja nógv minni til niðrandi málburðin, har tingfólk gera gjøldur og leypa framav í heilum. Kvinnur tosa ikki soleiðis, tíbetur, sigur Helena Dam á Neystabø

- Ja, eg krympi ofta tærnar, tá eg siti heima og lurti eftir tingvarpinum, skoytir Katrin Dahl Jakobsen uppí.

> **» Eg kann samstarva við øll í kirkjuni – eisini við uppafturgift og kvinnuligar prestar.**
>
> Theodor E. D. Olsen, prestur í Kvívík

> **» Eg skilji væl føroyskt, og eg kann eisini siga okkurt á føroyskum, men børnini steðga mær skjótt. Tey halda, at tað er pínligt, at eg tosi føroyskt.**
>
> Dan Michael Knudsen, Ríkisumboðsmaður

## Pakka fram og støva av

Jenny Petersen, leiðari fyri Tjóðpall Føroya heldur lítið um korini, sum føroysk listafólk hava at arbeiða undir her í landinum. Men hon heldur speiskliga fyri, at av og á bragdar.

- Ikki tí, politikararnir vilja fegnir hava føroysk listafólk at framføra fyri eitt nú útlendskum gestum. Tá verða okkara listafólk tikin úr skápinum og støvað av fyri síðani at verða pakkað niður aftur, tá gestirnir eru farnir, sigur Jenny Petersen.

## Didda í reiðrið



**Kollfirðingar áttu fyrst fødda barnið í Føroyum í 2008, og endiliga kom ein didda í reiðrið hjá teimum báðum Siv og Eyðfinn Joensen úr Kollafirði. Tey áttu frammanundan tríggjar dreingir.**

**- Hon hevur ordiliga lumpað okkum, tí vit vóru øll sannførd um, at tað fór at vera enn ein drongur, sigur eydnuríka mamman**

**Dóttirin var 55 cm til longdar og vigaði 4250 g.**

## Millióningar í tómum íløtum

Meiri enn tveir triðingar av øllum einnýtisíløtum við øli og sodavatni, sum verða keypt í Føroyum, verða tveitt burtur og verða sostatt ikki latin innaftur. Tað upplýsir Heilsufrøðiliga Starvsstovan.

Hvørja ferð eitt blikk, ella okkurt annað einnýtisílat av øli ella sodavatni, verður keypt, verður ein ávís upphædd goldin í panti. Tað merkir, at Føroya fólk hevur mist 1,2 millión krónur, sum tey høvdu fingið aftur í panti, vórðu íløtini latin.